

*Kári P. Højgaard heldur, at Sjálvstýrisflokkurin sum tann einasti sosial-liberalistiski flokkurin í Føroyum hevur eina pragmatiska og realistiska valskrá*

# Sjálvstýrisflokkurin góðar vónir til valið

**"Tann gongda leiðin" er herrópið hjá Sjálvstýrisflokkinum til komandi valið, og hon er at finna á miðjuni í føroyskum politikki**

LØGTINGSVAL
*Bartal Nolsøe Poulsen*

So kom eisini valskráin hjá Sjálvstýrisflokkinum út millum manna. – Sjálvstýrisflokkurin lovar ikki gull og grønar skógir, men gevur eitt realistiskt boð uppá, hvussu Føroyar skulu skipast, segði Kári P. Højgaard millum annað á tíðindafundi týsmorgunin. Sjálvstýrisflokkurin ætlar sær at leggja dent á at reka ein virknan vinnulívs-, umhvørvis- og familjupolitikk.

### Gongda leiðin til sjálvstýri

Í stuttum er ætlanin hjá Sjálvstýrisflokkinum á sjálvstýrisleið, at Føroyar skulu gerast sjálvbjargnar. Sambært teimum skal sjálvstýrisgongdin halda fram eftir tí sama leisti, sum Sjálvstýrisflokkurin hevur slóðað fyri. Føroya fólk skal einsamalt og endaliga taka avgerðina um tilknýti okkara til Danmarkar, og Sjálvstýrisflokkurin vil staðfesta føroyska sjálvsavgerðarrættin í eini føroyskari grundlóg. Skulu Føroyar síðani loysa frá samveldinum Danmark, skal Føroya fólk gera hetta av á eini fólkaatkvøðu.

Kári P. Højgaard vildi á tíðindafundinum ikki vísa aftur, at Sjálvstýrisflokkurin fór í eina samgongu, sum fór at sleppa yvirtøkulógini, teir higartil hava arbeitt við í landsstýrinum. Dentur var tó lagdur á, at yvirtøkan av t.d. fólkakirkjuni skuldi fremjast, og at arbeiðast skuldi miðvíst fyri, at yvirtøkur verða framdar, so hvørt fíggjarligir møguleikar verða fyri teimum.

### Fíggjarviðurskifti

Sjálvstýrisflokkurin ætlar ikki at taka meira inn frá borgarunum enn hægst neyðugt. So mikið av skatti skal takast inn, sum skal til fyri at skapa eitt nútímans vælferðarsamfelag við líkarætti, menning og virðing fyri einstaka menniskjanum. Hóast hetta, so mugu skattur og avgjøld ikki forða fyri arbeiðs- og framleiðsluskapandi fyritaksemi hjá tí einstaka. Rationaliseringar skulu gerast sum við tíðini kunnu vera við til at lækka persónliga skattin.

Sjálvstýrisflokkurin heldur fíggjarstøðuna hjá føroyska samfelagnum vera góða, hóast ein niðurgongd er at síggja í búskapinum. Føroyska vinnan er nærum skuldarfrí og føroyska samfelagið hevur hópin av peningi á bók uttanlanda, so flokkurin stúrir ikki fyri framtíðini.

### Vinnupolitikkur

Sjálvstýrisflokkurin fer at virka fyri at betra karmarnar hjá einum sjálvberandi føroyskum vinnulívi at fremja skynsama einskiljing av almennum fyritøkum. Partur av vinnupolitiska hugsan Sjálvstýrisfloksins er, at:

- Høvuðsvinnan má hava best hugsandi kor
- Tilfeingið í havinum má røkjast við varsemi og skynsemi
- Flokkurin vil tryggja alivinnuni betri karmar.
- Peningur skal játtast til málrættaða gransking og menning av nýggjum vørum og nýggjum marknaðum
- Ferðavinnan skal mennast
- Landbúnaðurin skal nýskipast.

Fyri at tryggja alivinnuni betri karmar skal latast upp fyri betri atgongd til fíggjing, eisini útlendskari, eins og møguleiki skal vera fyri at geva veð í aliloyvum. Tosað varð eisini um at fáa meira burturúr tí tilfeingi, vit hava, m.a. hátøkni-úrdráttir úr fiski.

### Mentan og útbúgving

Útbúgving er ein tann týdningarmesta íløgan í okkara samfelag. Útbúgvingaravtalur skulu framhaldandi gerast við onnur lond, so vit kunnu leggja aftur at vitan, førleika og mentan úr øðrum londum.

Sjálvstýrsiflokkurin fer at virka fyri einum mentanarpolitikki, sum fer at geva okkum fleiri mentanartilboð og betri møguleika fyri mentanarligum virksemi. Eisini skulu umstøðurnar hjá fólka- og miðnámsskúlunum betrast og styrkjast. Sjálvstýrisflokkurin fer at tryggja, at Fróðskaparsetrið og aðrir stovnar fáa munandi betri umstøður at granska og undirvísa.

### Náttúra

Vit hava eina livandi jørð, og livikorini á jørðini eru grundarlagið fyri livikorum okkara. Dálka vit jørðina, dálka vit okkum sjálvi. Tí hevur Sjálvstýrisflokkurin sett sær fyri, at munandi meira skal gerast fyri at økja um fólksins tilvitan um umhvørvis- og náttúruvernd. Tað skal vera lógarkrav, at tá ið størri verkætlanir verða framdar, so skulu haldgóðar ársmetingar gerast, áðrenn farið verður til verka.

Sjálvstýrisflokkurin ætlar at skipa náttúruumsiting við fakligum førleika, og orkupolitikkurin eigur at byggja á orkukeldur, ið hava fyrilit fyri umhvørvinum. Flokkurin vil økja um sól- og vindorkuframleiðslu í størst møguligan mun.

Sjálvstýrisflokkurin hevur skipað einastu yvirtøkuna hetta valskeiðið, yvirtøkuna av havumhvørvinum, og hevur evnað til nýggja lóg at verja havumhvørvið. Flokkurin fer at virka fyri, at Kyoto-sáttmálin fer at umfata Føroyar, so at útlátið av koltvíiltu verður minkað.

### Familjan

Familjan er ein av hornasúlunum í føroyska samfelagnum. Tí ynskir Sjálvstýrisflokkurin at fáa ein virknan familjupolitikk settan á dagsskrá. Hann skal umfata:

- Eftirløn til øll
- Allir samfelagsbólkar skulu hava sømilig kor
- Øll skulu hava rætt til ein bústað
- Øll skulu hava møguleika fyri barnaansing
- Fyribyrging og upplýsing um misnýtslu av rúsevnum

Øll skulu hava eina eftirløn, sum er til at liva av. Flokkurin ætlar at loysa eftirlønarspurningin í samráð við vinnuna og sigur, at øll eiga at lata part av lønini til eftirløn.

Flokkurin fer at virka fyri, at lutaíbúðir og aðrir alternativir bústaðarmøguleikar verða tøkir, og miðja verður eftir, at eldri fólk, ið ynskja at flyta í smærri bústað skulu hava møguleika til tess.

Sjálvstýrisflokkurin vil hava fult innlit og opinleika í øll politisk og umsitingarlig viðurskifti. Skal borgarin hava álit á politisku skipanini, mugu borgararnir og fjølmiðlarnir hava fult innlit í politisku fyrisitingina, og tí má lógin um alment innlit fáast at virka í verki.



# Sjálvstýrisfólk ymisk á máli

**Valskráin hjá Sjálvstýrisflokkinum er løgd fram. Sjálv framløgan var merkt av, at vítt er til veggja í flokkinum. Sjálvstýrisflokkurin var í fleiri førum rættiliga ógreiður um, hvat flokkurin stendur fyri í einstøkum málum**



*Sjálvstýrisflokkurin hevði eina heldur ógreiða framløgu av valskránni týsmorgunin. Vítt er til veggja í flokkinum, og tað kom greitt til sjóndar. Valevnini eru ymisk á máli um fleiri evni.*

*Mynd: Jens K. Vang*

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Postmaður, forsangari, koyrilærari, landsstýrismaður, fyrrverandi tjóðveldismenn og búskaparfrøðingur. Valevnini hjá Sjálvstýrisflokkinum til løgtingsvalið mugu sigast at vera er ein góð blanding av bommum. Hvussu væl bommini fara smakka fáa vit at vita 20.januar.

Veljarakanningarnar hava spátt flokkinum eitt hart valstríð, har stóra uppgávan verður at vinna sætið á tingi aftur. Komandi 14 dagarnar fara sjálvstýrisfólk kring landið at arbeiða miðvíst fyri, at næst elsti flokkur í Føroyum varðveitir tingsessin.

Uppskriftin til valstríðið varð løgd fram týsmorgunin. Framløgan av valskráini hjá Sjálvsstýrisflokkinum var heldur øðrvísi skipað, enn framløgurnar hjá hinum flokkunum hava verið.

Sammett við undanfarnar framløgur, hevur tað í stóran mun verið floksleiðarin, ið hava svarað spurningum frá fjølmiðlafólki, men undir framløguni hjá Sjálvstýrisflokkurin, sluppu fleiri ymisk valevni fram at at svara spurningum.

Hetta gav eina øðrvísi dynamikk, men var eisini við til at gera framløguna ørkymlandi. Dømi vóru um, at áskoðanin hjá floksformanninum Kára P. Højgaard ikki var tann sama um hjá onkrum av valevnunum.

Nevnast kann eitt nú spurningurin um útlendska partin í alivinnuni, har nýggja valevni í Suðurstreymi, Malan Johansen hevði eina greiða áskoðan, men floksformaðurin var heldur ógreiður um støðuna hjá flokkinum. Tað sama var galdandi viðvíkjandi spurninginum um yvirtøkulógirnar, har ymiskar meiningar vóru um, hvussu skjótt skuldi farast fram.

Sum sagt var ógreiði boðskapurin hjá Sjálvstýrisflokkinum í einstøkum málum ørkymlandi, tí undir eini framløgu av valskráini hjá flokkinum, hevði ein væntað, at flokkurin hevði ein so greiðan boðskap sum gjørligt.

### Kittið

Sjálvstýrisflokkurin verður ofta nevndur sum kittið í føroyskum politikki. Flokkurin hevur verið í nógv flest samgongum eftir Heimastýrislógina. Flokkurin er ein pragmatiskur miðflokkur, sum kann samstarva við allar flokkar. Leiklutin sum miðflokkur í politisku skipanini hevur flokkurin ongar ætlanir um at sleppa.

– Valið hesaferð fer ikki at snúgva seg um loysing ella samband, ei heldur høgra ella vinstra. Løgtingsvalið verður eitt val um miðjuna, har vit eru at finna, sigur Kári P. Højgaard.

Sjálvstýrisflokkurin vil eins og hinir flokkarnir ikki útihýsa nøkrum flokki, áðrenn valúrslitið fyriliggur. Kári P. Højgaard róð framundir, at Sjálvstýrisflokkurin fer í ta samgongu, har flokkurin fær mest burturúr· Formaður Sjálvstýrisfloksins var ikki samdur við uppáhaldini hjá Tjóðveldisflokkinum um, at Tjóðveldisflokkurin er lokomotivið á sjálvstýriskós.

– Vit eru noydd at hava eina sjálvstýriskós, har alt fólkið er aftanfyri. Sjálvstýrisflokkurin stendur fyri einari realistiskari kós í sjálvstýrismálinum, og eg haldi, at vit kunnu kalla okkum lokomoti, sigur Karí P. Højgaard.

### Stuðulin tikin burtur

Á tíðindafundinum týsmorgunin kom fram, at Sjálvstýrisflokkurin heldur ikki fer at stuðla Anfinni Kallsberg sum møguligum løgmansevni eftir valið 20.januar. Sjálvstýrisflokkurin hevur annars havt eitt tætt samstarv við Fólkaflokkin seinastu árini, og eftir avdúkingarnar um løgmann í bókini, Skjót journalistin, var Sjálvstýrisflokkurin skjótur at stuðla løgmanni.

Nú er kortini vent í holini. Flokkurin sigur, at av tí, at allir hinir flokkarnir ikki vilja hava Anfinn Kallsberg sum løgmansevni, heldur flokkurin ikki, at tað er ráðiligt, at flokkurin stuðlar honum. Lasse Klein legði afturat, at tað var ikki gamalt, at Sjálvstýrisflokkurin peikaði á eitt ávist løgmansevni, áðrenn valúrslitið fyri lá.

### Útlendingar í alivinnuni

Sjálvstýrisflokkurin sigur í valskrá síni, at flokkurin vil virka fyri sjálvberandi føroyskum vinnulívi. Víðvíkjandi kreppuraktu alivinnuni, heldur Sjálvstýrisflokkurin, at útlendingar skulu sleppa í størri mun fram at, enn teir gera í dag. Flokkurin heldur eisini, at fíggingarstovnarnir eiga at fáa pant í aliloyvunum.

Hóast Sjálvstýrisflokkurin tóktist vera nakað ógreiður um, hvussu stóran part útlendingar skulu sleppa at eiga í kreppuraktu alivinnuni, so vóru kortini røddir um, at útlendingar eiga sleppa at eiga 100% , um teir ynskja tað. Flokkurin setti kortini sum treyt, at útlendingar binda seg til at brúka aliloyvini á føroyskum firðum. Størri útlendskur partur og møguleiki fyri panti í aliloyvum skal verða við til at fáa alivinnuna upp á føtur aftur.

### Gengransking

Sjálvstýrisflokkurin sigur seg vilja hava kjakið um gengransking í Føroyum í ljósmála aftur. Sámal Petur í Grund sat seinast í nítárunum sum landsstýrismaður fyri Sjálvstýrisflokkin í Almannamálum, og tá var møguleikin um gengransking havdur á lofti.

Sámal Petur ásannar, at talan er um viðkvæmar upplýsingar hjá fólki, men hann heldur ikki, at tað eigur at taka fleiri ár, áðrenn ein politisk semja verður gjørd á økinum.

## Reyða bók bíðar framvegis

Reyða bók hjá danska søgufrøðinginum, Bent Jensen, er framvegis ikki latin løgmanni. Eftir ætlan skuldi frágreiðingin vera latin Anfinni Kallsberg um árskiftið, men hon er so ikki komin fram enn.

Hernaðarkanningin um kalda kríggið eystanfyri fer óivað at elva til drúgt kjak í Føroyum, og ikki minst um kanningin verður løgd fram í valstríðnum. Av Løgmansskrivstovuni siga tey, at so skjótt kanningin verður latin løgmanni, verður hon almannakunngjørd.

**-páll**